**Løgtingið** **Fiskimálaráðið**

3. mars 2016
Mál: 16/00119-16

Viðgjørt: MM/KM

**Løgtingsmál nr. 73/2015: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grind og annan smáhval (Grindalógin)** (Revsing o.a.)

## Uppskot til

## Løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um grind og annan smáhval (Grindalógin)
(Revsing o.a.)

### § 1

Í løgtingslóg nr. 56 frá 19. mai 2015 um grind og annan smáhval, sum broytt við løgtingslóg nr. 73 frá 22. mai 2015 og løgtingslóg nr. 93 frá 22. juni 2015, verða gjørdar hesar broytingar:

**1.** Í § 1 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 3.* Reglurnar í stk. 1 og 2 eru eisini galdandi, tá grind verður merkt til vísindaligt endamál og ikki skal drepast."
Stk. 3 verður eftir hetta stk. 4.

**2.** Í § 2, stk. 1 verða nr. 2 og nr. 6 strikað. Nr. 3-5 verða eftir hetta nr. 2-4.

**3.** Í § 2 verður aftan á stk. 1 sum nýtt stk. sett:
"*Stk. 2.* Tað er loyvt at skjóta nísu, Phocoena phocoena."
Stk. 2 og 3 verða eftir hetta stk. 3 og 4.

**4.** Í § 2, stk. 2, sum verður stk. 3, verður í 2. pkt. "omanfyri" broytt til: "teimum í stk. 1".

**5.** Í § 2, stk. 3, sum verður stk. 4, verður "stk. 1" broytt til: "stk. 1 og 2".

**6.** Í § 3, stk. 1 verður aftan á "smáhvalir," sett: "tó ikki nísa,".

**7.** Í § 3, stk. 2 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Harumframt kann sýslumaðurin gera av at lýsa øki á landi ella í loftrúminum yvir sum grindaøki."

**8.** Í § 3, stk. 4 verður aftan á "grindadrápi" sett: "ella merking til vísindaligt endamál".

**9.** Í § 3, stk. 4 verður aftan á 1. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Ikki er loyvt at seta upp skipanir, tað veri seg á landi, í havinum ella í loftrúmi, sum kunnu broyta atferð hjá hvali, uttan at landsstýrismaðurin frammanundan gevur loyvi til hetta."

**10.** Í § 3, stk. 5 verður aftan á 2. pkt. sum nýtt pkt. sett:
"Ikki er loyvt at reka grind til aðra hvalvág enn hana, sýslumaður hevur tikið avgerð um."

**11.** Í § 4, stk. 3 verður aftan á 3. pkt. sum nýtt pkt. sett:

“Ikki er loyvt at halda áfram við drápi, sum sýslumaðurin hevur givið boð um at steðga.”

**12.** Í § 13, stk. 1 verður “§ 3, stk. 1-4” broytt til: “§ 3, stk. 4 og stk. 5, 3. pkt.” og “§ 4, stk. 1 og 3” broytt til: “§ 4, stk. 3, 4. pkt.”

**13.** Í § 13 verður aftan á stk. 2 sum nýtt stk. sett:
“*Stk. 3.* Tá revsing verður ásett sambært stk. 1 og 2, skal tað metast sum herðandi umstøður, um brot eisini er framt á § 3, stk. 1 um fráboðanarskyldu.”
Stk. 3-5 verða eftir hetta stk. 4-6.

**14.** Í § 13, stk. 3, sum verður stk. 4, verður “§ 2, stk. 3” broytt til: “§ 2, stk. 4”.

**§ 2**

Henda løgtingslóg kemur í gildi dagin eftir, at hon er kunngjørd.

**Kapittul 1. Almennar viðmerkingar**

Við hesum uppskoti verða broytingar í løgtingslóg um grind og annan smáhval lagdar fyri Løgtingið. Ætlanin er serliga at broyta revsiásetingarnar fyri fráboðan, men samstundis verða aðrar tillagingar gjørdar.

**Orsøkir til uppskotið**
Á vári 2015 var nýggj og dagførd lóggáva sett í gildi fyri grind og annan smáhval, hvørs endamál er at útvega eitt greitt lógargrundarlag fyri elligomlu siðvenjuni hjá føroyingum at drepa grind og at tryggja, at grindadrápið kann ganga skjótt og væl uttan uppíblanding frá óviðkomandi.

Lógin tryggjar somuleiðis ítøkiliga og greiða lógarheimild at revsa fyri staðfest brot á reglurnar í lógini, ella reglur, ásettar við heimild í lógini.

Eftir at lógin hevur virkað í eina tíð, er greitt, at tørvur er á ávísum dagføringum.

Fleiri av broytingunum eru av meira tekniskum slagi, m.a. at taka døgling úraftur, tí talan er ikki um hval, sum loyvi er at veiða, at áseta greitt, hvussu nísa verður veidd, at lýsa grindaøki til eisini at kunna fevna um land og loftrúm og forboð fyri at seta upp skipanir, ið kunnu órógva hval uttan loyvi.

Eisini hevur revsingin fyri brot á fráboðanarskylduna elvt til nógv kjak og fleiri atfinningar, serliga frá ferðavinnuni, sum hevur víst á, at fráboðanarskyldan kann styggja ferðafólk burtur. Eitt nú velja summi reiðarí Føroyar frá sum ferðamál fyri teirra ferðafólkaskip, tí tey vilja ikki seta ferðafólk og manningar í váða fyri at koma undir stóra bót, fyri ikki at boða frá eini grind.

Uppskotið er somuleiðis liður í ætlan landsstýrisins at betra um og tryggja, at grindadráp kann ganga skjótt og væl uttan uppíblanding frá óviðkomandi og skal síggjast í samanhangi við øðrum ætlaðum fyriskipanum frá Føroya landsstýri.

**Galdandi lóggáva**

Lógin skipar grind og grindadráp og fevnir eisini um lógliga tøku og veiðu av øðrum smáhvalasløgum.

*Døglingur og nísa*
Reglurnar um grind og grindadráp hava sambært lóg og siðvenju eisini verið galdandi fyri skjórutan springara, kjafthvítan springara og hvessing.

Veiða av nísu og tøka av døglingi er øðrvísi skipað sambært lóg og siðvenju. Nísa verður ikki hildin til á sama hátt sum nevndu hvalasløg, men veiðimenn hava loyvi at skjóta nísu.

Døglingur er friðaður sambært løgtingslóg um hvalaveiðu, og einans døglingur, sum svimur seg inn á firðir og ger landgongd, má verða avlívaður sambært lóg um vernd av dýrum. Tí eiga reglurnar um grind og grindadráp í hesi lóg ikki at vera galdandi fyri nísu og døgling, og grindalógin má tískil broytast á hesum øki.

*Grindaøkið*
Sambært galdandi áseting er grindarakstarøkið sjóøkið kring grindina ein fjórðing í allar ættir. Heimild er at lýsa størri grindarakstrarøki, um sýslumaðurin metir tað neyðugt. Greitt er tó, at tað fevnir bert um sjóøkið sum grindarakstrarøki.

Galdandi grindakunngerð nýtir eisini hugtakið grindaøki, sum kann fevna um land, hav ella loftrúm. Ivasamt er, um heimildin í lógini um sjóøki er nóg greið og neyv til tílíkar reglur og til tess at tryggja, at sýslumaðurin eisini hevur heimild at lýsa øki á landi ella í loftrúmi sum grindaøki, verður nú beinleiðis ásett í lógini henda heimild.

*Fráboðanarskyldan*
Løgtingslógin um grind og annan smáhval ásetir í § 3, stk. 1, at grindaboð skulu fráboðast sýslumanni beinanvegin, uttan mun til, um grindin er sædd av fólki á báti ella skipi, í tyrlu ella flogfari ella fólki á landi. Revsing fyri brot á § 3, stk. 1 er bót.

Fráboðanarskyldan skal fyri tað fyrsta tryggja, at boð um grind beinanvegin koma til sýslumannin, tí sýslumaðurin hevur serligar heimildir og skyldur í sambandi við grindadráp.

Tað er sýslumaðurin, ið stílar fyri grindadrápi og hevur eftirlit við, at rakstur og dráp fara fram eftir reglunum, og skal hann, saman við grindaformonnunum, ansa eftir, at ein og hvør ger sína skyldu.

Hetta hevur serliga til endamáls at tryggja, at rakstur og dráp ganga á besta hátt og við minst møguligum ampa/inntrivi fyri grindina frá tí løtu, at grind er funnin, undir rakstri, meðan hon verður hildin til og avlívað.

Harumframt skal sýslumaðurin, saman við grindaformonnunum og øðrum heimildarfólki, tryggja, at tað fer rætt fram, tá grindin verður merkt, skorin upp og skift, soleiðis at tey, ið hava rætt til part, fáa sín part, umframt at rovini verða burturbeind á skynsamasta hátt.

Fyri tað næsta er endamálið við fráboðanarskylduni at undirstrika týdningin av, at tað er ein borgaraskylda at boða frá grind, tí tað hevur stóran samfelagsligan týdning, eins og tað hevur

havt upp gjøgnum øldirnar, tí grindin er eitt ískoyti til dagliga húsarhaldið hjá familjum. Um grind ikki verður fráboðað, fer eitt stórt samfelagsvirði fyri skeytið, sum hevur stórt fíggjarligt virði fyri húsarhaldið.

Sambært viðmerkingunum til galdandi lóg verður víst á, at tíðin er búgvin til eisini at herða revsingina fyri brot á grindalóggávuna. Hóast mest vanliga revsingin hevur verið bót, og kanska framhaldandi eisini verður mest vanliga revsingin fyri brot á grindalóggávuna, so er ynskiligt, at bótarstøddirnar verða størri, enn tær higartil hava verið. Samfelagsliga og revsirættarliga verður hildið gagnligt at gera upp við farna tíð og bótarstøddir og í staðin taka støði í dagsins samfelagi.

Í framhaldi av hesum mælti meirilutin í Vinnunevndini til, at bótin byrjar við eini upphædd upp á í minsta lagi 25.000 kr., og at tað við áseting av bótini sambært § 13, stk. 1 skal takast hædd fyri vøkstrinum í føroyska prístalinum.

Fleiri atfinningar hava tó verið mótvegis heimildini at revsa fyri vantandi fráboðan. Víst hevur verið á trupulleikan við at lyfta próvbyrðuna fyri, at fólk hava sæð grind og ikki boðað frá, eins og hon serliga rakar tey, ið av ymsum orsøkum ikki ynskja at boða frá grind, men annars ikki leggja seg út í grindadráp.

**Endamálið við uppskotinum**

*Døglingur og nísa*
Døglingur hevur verið friðaður, og einans døglingur, sum svimur seg inn á firðir og ger landgongd, verður avlívaður. Døglingur kemur undir ásetingarnar í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 20. mai 1996, og er í samsvari við reglur, ásettar av Altjóða hvalaveiðinevndini IWC (International Whaling Commission).

Døglingur er friðaður sambært § 4, stk. 1 í hesi lóg, og § 4, stk. 3 ásetir: ”Friðaður hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast sambært lóg um vernd av dýrum, er ogn hjá landinum.” Tí verður døglingur tikin úr lógini um grind og annan smáhval.

Samstundis verður loyvt at skjóta nísu. Nísa verður ikki hildin til á sama hátt sum grind, men loyvt hevur verið at skjóta nísu.

Døglingur og nísa verða við hesum uppskoti tikin úr listanum yvir smáhvalasløg í § 2, stk. 1, sum loyvt er at taka ella veiða.

Hugtakið grind og grindadráp fer at vísa til smáhvalasløgini í § 2, stk. 1 og fer bara at fevna um langbøkslutan grindahval, skjórutan springara, kjafthvítan springara og hvessing.

Í § 3, stk. 1 verður gjørt greitt, at ásetingarnar um grindaboð fyri grind ella annan smáhval ikki eru galdandi fyri nísu.

*Grindaøki*
Við hesum uppskoti fer sýslumaðurin at fáa greiða heimild at lýsa grindaøki eisini á landi og í loftrúmi. Tá øki verður lýst grindaøki, má hetta eyðsæð gerast soleiðis, at størri avmarkingar ikki verða settar upp fyri almenninginum, enn hvat krevst fyri at tryggja atliti at

grindadrápinum og atliti at teimum, sum eru í grind, soleiðis at sjálvt grindadrápið kann ganga sína vanligu og skipaðu gongd.

*Forboð móti at seta upp skipanir, ið kunnu ávirka farleiðina hjá hvali*
Talan er um áseting, ið áður hevur verið ásett í grindakunngerðini (§ 4), og sum er ein almenn áseting um skipanir, ið kunnu ávirka hvalin. Neyvan er heimild í galdandi løgtingslóg um grind fyri hesari áseting, eins og mett verður, at hetta er áseting, ið eigur at verða ásett við lóg heldur enn við kunngerð.

*Fráboðanarskylda*
Endamálið við hesum uppskoti er at strika ásetingina um revsing fyri brot á fráboðanarskylduna.

Fráboðanarskyldan hevur tó ikki verið revsiverd frá 1986, og til nýggja lógin varð samtykt á sumri í 2015.

Fiskimálaráðið metir, at hóast atfinningar frá ferðavinnuni mótvegis sjálvari fráboðanarskylduni og ikki einans revsingini, er neyðugt at halda fast við eina fráboðanarskyldu, sum ikki einans er ein skilhaldsregla, men ein skylda. Hetta grundar Fiskimálaráðið á, at vantandi skylda at boða frá grind kann hava við sær, at grind verður fráboðað ov seint ella als ikki, og tískil kann elva til óskipaðan rakstur og óskipað grindadráp og harvið óneyðuga líðing fyri djórið (hvalin).

Loyvi krevst ikki at reka grind, og tí stendur tað einum og hvørjum frítt fyri at fara í grind. Tískil er alneyðugt at geva grindaboð, so grindarakstur og grindadráp kann fara fram undir skipaðum viðurskiftum.

Aldargamla siðvenja okkara er, at finnari fær serligan part, finningarfiskin, tá grind verður skift. Mett verður, at hetta er við til at tryggja, at boðað verður frá. Tískil verður ikki neyðugt at revsa fyri brot á fráboðanarskylduna, eins og talan er um próvbyrðu, ið er tung at lyfta.

Hóast vantandi fráboðan ikki inniber revsing í sær sjálvum, verður mett, at vantandi fráboðan framhaldandi eigur at hava týdning, um onnur revsiverd brot verða framd á grindalógina.

Hetta verður gjørt á tann hátt, at um onnur brot eru á grindalógina, ið kunnu revsast, og at viðkomandi samstundis heldur ikki hevur hildið fráboðanarskylduna, verður vantandi fráboðanin at meta sum herðandi umstøða, tá brot skal revsast. Onnur brot á grindalógina í hesum sambandi kunnu t.d. vera at halda áfram við drápinum, sum sýslumaður hevur givið boð um at steðga, tá órógvað verður samstundis, sum grind verður merkt til vísindaligt endamál ella hildin til á vanligan hátt. (Talan er her um dømi).

*Aðrar dagføringar*
Aðrar dagføringar eru m.a. at víðka um virkisøki lógarinnar til eisini at fevna um grind, ið verður merkt til vísindaligt endamál. Hetta er avleiðing av dómi í Føroya Rætti, har tað ikki kundi dømast fyri brot á grindalógina í sambandi við uppíblanding, tá grind varð merkt til vísindaligt endamál. Rætturin metti ikki, at virkisøki lógarinnar eisini var merking av grind til vísindaligt endamál, tí § 1, stk. 1 og 2 fevna bert um grindadráp.
Harumframt eru tillagingar og nágreiningar gjørdar í sambandi við revsing av ávísum brotum (§ 3, stk. 4 og 5 og § 4, stk. 3).

**Ummæli og ummælisskjøl**
Uppskotið hevur verið til ummælis hjá:
Sýslumonnunum
Føroya Landfúta
Grindamannafelagnum
Náttúrugripasavninum
Visit Faroe Islands
Ferðavinnufelagnum

**Ferðavinnufelagið** fegnast um, at revsingin fyri brot á fráboðanarskylduna verður tikin av, men vísir samstundis á, at fyri vinnuna hevði verið best, um fráboðanarskyldan varð strikað, soleiðis at møguleiki ikki er til staðar at føra fram, at føroyingar og ferðafólk í Føroyum fremja lógarbrot, um tey ikki boða frá grind.

**Visit Faroe Islands** vísir m.a. á, at tey meta ikki, at ein avtøka av revsingini er nóg mikið, og tey duga ikki at síggja, hví fráboðanarskyldan skal standa í galdandi lóggávu. M.a. vísa tey á, at frá 6/1-1986 til 19/5-2015 eru 24.882 grindahvalir hildnir til í Føroyum, hóast ongin revsing var um vantandi fráboðan.

Í mun til ferðavinnuna meta tey ikki, at tað, at revsingin verður tikin burturúr lóggávuni, fer at hava nóg stóra jaliga ávirkan. Víst verður á, at áðrenn nýggja lóggávan varð sett í gildi í 2015, var fráboðanarskyldan ikki eitt evni, ið ferðafólk og ferðavinnan máttu fyrihalda seg til. Meting teirra er, at um tann neiliga ávirkanin, sum broytingin í grindalógini í 2015 hevði við sær, skal betrast, er neyðugt at taka fráboðanarskylduna úr lóggávuni. Heitt verður tí á landsstýrismannin um at bera so í bandi, at fráboðanarskyldan verður heilt strikað, ella at lóggávan verður orðað á ein hátt, har fráboðanarskyldan bert er galdandi fyri fólk, ið búgva í Føroyum.

**Náttúrugripasavnið** tekur undir við, at døglingur verður strikaður úr grindalógini. Samstundis vísir Náttúrugripasavnið á ymisk viðurskifti viðvíkjandi veiðu av nísu. M.a. er ivasamt, um hagtølini, sum vísa millum lítla og onga nísuveiðu, eru eftirfarandi. Tað er sannroynd, at ein ókendur, men kanska stórur partur av skotnum nísum søkka og tí ikki koma til høldar. Eisini vísa tey á, at tað er sannlíkt, at ein ókendur partur av veiðimonnunum ikki kenna til fráboðanarskylduna, tá teir veiða nísu og tí ikki boða frá.

Savnið metir, at tað er neyðugt hjá teimum at gera eina kanningarætlan fyri nísu, fyri at fáa til vega álítandi hagtøl og neyðugan kunnleika fyri at kunna taka støðu til, um tað er burðardygt at veiða nísu, og hvussu nógva veiðu stovnurin tolir.

**Føroya Landfúti** vísir á, at tá grindaøkið verður víðkað til eisini at fevna um loftið yvir grindini, eigur hetta at verða sent loftferðslumyndugleikunum til hoyringar.

Harumframt eru nakrar viðmerkingar av tekniskum slagi, eins og víst verður á ynskiligar tøkniligar broytingar í verandi lóg.

Fútin vísir í sínum hoyringsskrivi harumframt á tvinnar umstøður.

Fyrra er, at dómur er sagdur í Føroya Rætti, sum ásetir, at grindarakstur við tí fyri eyga at merkja grind, ikki er fevnt av grindalógini. Tað merkir, at um fólk leggja seg út í grindarakstur,

tá tað er liður í at kunna merkja hval, kann tað ikki revsast við heimild í grindalógini. Um hetta ynskist at verða fevnt, er neyðugt at víðka um endamálsorðingina.

Hin umstøðan, sum víst verður á, er, at skyldan at geva grindaboð ikki kann fevna um ríkismyndugleikarnar. Hóast revsingin nú verður tikin av, eigur serstøða ríkismyndugleikanna at verða umrødd í viðmerkingunum.

Fiskimálaráðið hevur í ávísan mun tikið viðmerkingarnar frá hoyringspørtunum til eftirtektar.

Í mun til áheitanina um at strika fráboðanarskylduna heilt, metir Fiskimálaráðið, at hetta kann hava við sær, at grind verður fráboðað ov seint, sum tískil kann elva til óskipaðan rakstur og óskipað grindadráp og harvið óneyðuga líðing fyri djórið, eins og vandi er fyri mannskaða.

Endamálið við at boða frá, at grind er funnin, er júst at tryggja skipað viðurskifti.

Harumframt er týdningarmikið at gera vart við, at tað er bara, til tann fyrsti hevur boðað frá grind á røttum stað, at skyldan er. Eftir tað er hon burturdottin. Øll hini, sum síggja somu grind, hava ikki fráboðanarskyldu.

Eisini hevur grindin stórt peningaligt virði fyri eitt lítið samfelag sum tað føroyska, tí tað er ókeypis, og fer hetta fyri skeyti, um boðað ikki verður frá grind.

Loysnin, ið Visit Faroe Islands vísir á, um bert at lata skylduna vera galdandi fyri ávísar bólkar, eigur løgfrøðiliga at verða viðfarin við varsemi, tí sama gerð ikki hevur somu avleiðing fyri tvey, hvørs umstøður annars eru tær somu. Revsirættarliga er meginreglan, at tað er tann ávísa gerðin, ið er revsiverd, heldur enn at ávísur mannahópur er undantikin ella álagdur skylduna.

Í mun til at lata grindaøkið eisini fevna um loftið yvir grindini, er talan um áseting frá verandi grindakunngerð, sum er í gildi, og sum upprunaliga varð sett í grindakunngerðina í 2011 í samráð við m.a. donsku løgreglumyndugleikarnar. Grind er yvirtikið málsøki, og metir Fiskimálaráðið, at nýggja orðingin er linari enn upprunaliga orðingin, og at tað tískil ikki er neyðugt at umrøða enn einaferð við danskar ríkismyndugleikar.

## Kapittul 2. Avleiðingarnar av uppskotinum

### Fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur fíggjarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### Umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur
Mett verður ikki, at uppskotið hevur umsitingarligar avleiðingar fyri land og kommunur.

### Avleiðingar fyri vinnuna
Mett verður, at uppskotið í høvuðsheitum hevur jaligar avleiðingar fyri ferðavinnuna, ið júst hevur víst á vansan við revsing av fráboðanarskylduni. Í sambandi við hoyringina hevur vinnan tó víst á, at tey heldur ynskja fráboðanarskylduna strikaða heilt. Hesum tekur Fiskimálaráðið ikki undir við. Víst verður til viðmerkingarnar til hoyringsskrivini.

### Avleiðingar fyri umhvørvið

Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri umhvørvið. Døglingur verður tikin úr lógini, og er nú, eins og áður, friðaður sambært lóg um hvalaveiðu, og einans døglingur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu, kann avlívast. Loyvt verður at skjóta nísu, eins og tað hevur verið síðan 1986. Veiðimenn skulu lata sýslumonnum uppgerð um talið av nísum, sum eru skotnar. Sýslumenn hava onga fráboðan fingið um skotnar nísur seinastu nógvu árini, men mett verður tó, at ein avmarkað veiða fer fram. Nísa verður vanliga skotin við hagli, men mett verður ikki, at hetta hevur avleiðingar fyri umhvørvið.

Týdningarmikið er at hava álítandi veiðihagtøl. Náttúrugripasavnið fer nakað skjótt at gera eina kanningarætlan fyri nísu og kanna stovnsstødd og stovnsuppbýti, so tilmæli kann gevast um burðardygga veiðu av nísu. Sambært lógini er heimild hjá landsstýrismanninum í kunngerð at áseta neyvari reglur um veiðiuppgerð, avmarking av veiðinøgd, friðingartíðir o.a. fyri nísu.
Í grannalondunum er hjáveiða av nísu í veiðu eftir rognkelsi við gørnum ein trupulleiki. Í føroyskum sjógvi er garnaveiða ikki loyvd á grynri leiðum, og tí verða nísa og onnur havsúgdýr nærum ikki fingin sum hjáveiða í gørnum her.

**Avleiðingar fyri serstøk øki í landinum**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri serstøk øki í landinum.

**Avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar ella felagsskapir**
Mett verður ikki, at uppskotið hevur avleiðingar fyri ávísar samfelagsbólkar. Uppskotið kann hava við sær avleiðingar fyri felagsskapir, ið ætla at órógva, darva ella forða fyri grindadrápi, tí frameftir verður ikki revsað fyri brot á fráboðanarskylduna. Higartil er tó ongin dømdur sambært grindalógini fyri brot á fráboðanarskylduna.

**Millumtjóðasáttmálar á økinum**
Við hesi lógarbroyting verður døglingur tikin úr lógini og listanum yvir smáhvalasløg, loyvt er at taka ella veiða. Ásetingarnar fyri døgling og annan friðaðan hval verða sum í løgtingslóg um hvalaveiðu og eru í samsvari við reglur, ásettar av Altjóða hvalaveiðinevndini IWC (International Whaling Commission).

Norðuratlantiska nevndin fyri havsúgdýr, NAMMCO, er økisbundið samstarv um vernd, umsiting og gransking av havsúgdýrum í Norður Atlantshavinum. Føroyar eru limur í NAMMCO, sum viðger støðuna hjá hvalastovnum um okkara leiðir.

**Tvørgangandi millumtjóðasáttmálar**
Mett verður ikki, at uppskotið um at strika revsingina fyri vantandi fráboðan er í ósamsvari við tvørgangandi millumtjóðasáttmálar. Uppskotið er linari enn galdandi lóg, ið áleggur revsing fyri vantandi fráboðan. Um fráboðanarskyldan verður strikað heilt, er ongin trygd fyri, at grind verður fráboðað. Mett verður, at avgerandi fyrilit fyri at kunna skipa ein tryggan rakstur uttan vanda fyri mannalívi ella óneyðugari líðing hjá djóri er grundað á eina fráboðanarskyldu.

**Marknaforðingar**
Mett verður ikki, at uppskotið er atvoldin til ella brýtur við nakrar marknaforðingar.

**Revsing, útpanting, sektir ella onnur størri inntriv**
Uppskotið avtekur revsing fyri vantandi fráboðan. Í staðin verður vantandi fráboðan løgd afturat sum herðandi umstøða.

**Áleggur lógaruppskotið fólki skyldur**
Lógaruppskotið áleggur ikki fólki skyldur.

**Heimildir til onnur enn landsstýrismannin ella til kommunurnar**
Lógaruppskotið leggur ikki heimildir til onnur.

**Hevur lógaruppskotið aðrar avleiðingar**
Uppskotið hevur ikki aðrar avleiðingar.

| | Fyri landið/lands-myndugleikar | Fyri kommunalar myndugleikar | Fyri pláss/øki í landinum | Fyri ávísar sam-felagsbólkar/ felagsskapir | Fyri vinnuna |
|---|---|---|---|---|---|
| Fíggjarligar/ búskaparligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Ja |
| Umsitingarligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Umhvørvisligar avleiðingar | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Avleiðingar í mun til altjóða avtalur og reglur | Nei | Nei | Nei | Nei | Nei |
| Sosialar avleiðingar | | | | Nei | |

**Kapittul 3. Serligar viðmerkingar**

**Til § 1**
*Til nr. 1*
Við dómi úr Føroya Rætti 2. september 2015 varð dømt, at grindalógin ikki er galdandi, tá grind verður merkt til vísindaligt endamál. Tað merkir, at um grindin ikki verður hildin til, men skal merkjast, ber ikki til at fara fram eftir reglunum í grindalógini, tí hon bert fevnir um grindadráp. Til tess at broyta hetta soleiðis, at tað heldur ikki er loyvt at órógva, darva o.a., tá grind verður merkt til vísindaligt endamál, verður virkisøki lógarinnar víðkað til eisini at fevna um hesi viðurskifti.

*Til nr. 2*
Døglingur verður við hesari áseting ikki longur fevndur av løgtingslóg um grind og annan smáhval. Døglingur kemur undir ásetingarnar í løgtingslóg nr. 57 frá 5. juni 1984 um hvalaveiðu, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 54 frá 20. mai 1996, og einans døglingur, sum svimur seg inn á firðir og ger landgongd, verður avlívaður. Døglingur er friðaður sambært § 4, stk. 1 í hvalaveiðilógini, og sambært henni er friðaður hvalur, sum ger landgongd ella kemur í líknandi støðu og má avlívast sambært lóg um vernd av dýrum, ogn hjá landinum.

Døglingur verður við hesum uppskoti tikin úr listanum yvir smáhvalasløg í § 2, stk. 1, sum loyvt er at taka ella veiða.

*Til nr. 3*
Samstundis verður loyvt at skjóta nísu. Nísa verður ikki hildin til á sama hátt sum grind, men loyvt hevur verið at skjóta nísu. Soleiðis sum lógin hevur verið orðað, hevur nísa verið viðgjørd á sama hátt sum hini hvalasløgini.

Hugtakið grind og grindadráp fer at vísa til smáhvalasløgini í § 2, stk. 1 og fer bara at fevna um langbøkslutan grindahval, skjórutan springara, kjafthvítan springara og hvessing.

*Til nr. 4*
Konsekvensrætting í sambandi við broytingar í nr. 1 og 2.

*Til nr. 5.*
Konsekvensrætting í sambandi við broytingar í nr. 1 og 2.

*Til nr. 6*
Konsekvensrætting í sambandi við broytingar í nr. 1 og 2.

*Til nr. 7*
Grindarakstrarøki má skiljast sum øki, har grind kann rekast, og tískil ber ikki til at lata grindarakstrarøkið eisini fevna um loftrúmið. Tískil verður við hesari áseting víðkað um heimildina hjá sýslumanninum til eisini at lýsa eitt grindaøki. Grindaøkið kann fevna um land ella loftrúmið eisini. Orsøkin til broytingina er, at verandi heimild ikki er nóg greið til serliga at fevna um loftrúm. Mett verður tó, at tørvur í ávísum førum eisini er at lata loftrúmið vera grindaøki, soleiðis at t.d. tyrla ella drona ikki órógvar, og rakstur og dráp kann ganga sína vanligu og skipaðu gongd. Mett verður ikki, at tað í vanligum førum verður neyðugt at lata grindaøkið fevna um loftrúmið, tí higartil hevur tað ikki verið vanligt við tyrlum, dronum ella tilíkum, sum órógva.

*Til nr. 8*
Konsekvensbroyting í sambandi við broyting nr. 1.

*Til nr. 9*
Forboð móti at seta skipanir upp, ið ávirka farleiðina hjá hvali. Galdandi reglur eru í dag ásettar í grindakunngerðini, men mett verður, at tilíkar almennar reglur ístaðin eiga at verða ásettar í lóg.

*Til nr. 10*
Nágreining av verandi áseting. Eftir hesum verður tað ikki loyvt at reka grind á aðra hvalvág enn hana, sýslumaðurin tekur avgerð um. Verður hetta gjørt, kann viðkomandi revsast fyri brot á § 3, stk. 5, 3. pkt.

*Til nr. 11*
Nágreining av verandi áseting, tí ógreitt var, hvør revsiverda gerðin var, ið skuldi revsast sbrt. § 13, stk. 1.

Við hesum nýggja pkt. er greitt, at tað, um hildið verður áfram við grindadrápi, sum sýslumaðurin hevur givið boð um at steðga, er tað sum kann revsast sbrt. § 13, stk. 1.

*Til nr. 12*
Revsingin fyri brot á fráboðanarskylduna verður strikað. Frameftir verður brot á fráboðanarskylduna ikki revsað. Áður hevur brot kunnað havt við sær bót á kr. 25.000, um persónur, ið hevur sæð grind, ikki hevur boðað frá. Harumframt verður nágreinað, hvørjar gerðir eru revsiverdar sum avleiðing av broytingunum nr. 10 og 11. Áðrenn nágreiningina var ógreitt, hvør gerð var revsiverd, og hvør kundi revsast.

*Til nr. 13*
Hóast revsingin fyri brot á fráboðanarskylduna er strikað, er ætlanin, at vantandi fráboðan skal hava herðandi virknað, um so er, at onnur revsiverd brot eru framd á grindalógina, t.d. við at forða, darva ella órógva grindadráp. Meginreglan í revsiásetingini fyri brot á grindalógina er § 13, stk. 1, ið heimilar bót.

Bert undir umstøðum í stk. 2 kann revsingin hækka til fongsul upp í 2 ár.

Ætlanin við ásetingini í nýggja stk. 3 er, at um staðfest verður brot á fráboðanarskylduna, umframt onnur revsiverd brot á grindalógina, er útgangsstøðið, at revsingin kann herðast, um brot annars verður mett at koma undir § 13.

Tað merkir, at um útgangsstøðið er bót á 25.000 kr., kann bótin hækka eftir ítøkiligari meting frá dómstólunum, um ikki aðrar umstøður fyriliggja, ið linka ella herða, um brot samstundis er framt á fráboðanarskylduna.

Er talan um møguliga fongsulsrevsing fyri sjálvstøðug/t brot á grindalógina, eigur brot á fráboðanarskylduna eisini at telja við sum herðandi umstøður, tá revsing verður ásett.

*Til nr. 14*
Konsekvensrætting í sambandi við broytingar í nr. 1 og 2.

**Til § 2**
Áseting um gildiskomu.

Fiskimálaráðið, 3. mars 2016

**Høgni Hoydal (sign.)**
landsstýrismaður

/ Rógvi Reinert (sign.)

**Fylgiskjøl, sum ikki fáa lógargildi:**
Fylgiskjal 1: Ummæli frá Føroya Landfúta
Fylgiskjal 2: Ummæli frá Náttúrugripasavninum
Fylgiskjal 3: Ummæli frá Ferðavinnufelagnum
Fylgiskjal 4: Ummæli frá Visit Faroe Islands
Fylgiskjal 5: Javntekstur